MÁLTEIGURIN

Skurður

Nú verða skurðfjøllini skjótt gingin. Í tí orðinum hevur 'skurður« týdningin at drepa, t.e. skera høvdið av okkara sakleysu medskapningum, so at vit seinni kunnu eta teir


Annars er ein heilt annar týdningur nógv frammi í hesum døgum. Tað snýr seg um ein útlendskan politikara, sum væntandi »verður lagdur undir skurð«. Hetta skal vera »føroyskt« fyri at *operera*, sum annars øll siga. Tað er serliga útvarpið, sum fegnast um at leggja fólk undir skurð. Hetta er ein merkilig máliska. Vit kunnu leggja fólk undir so mangt. Vit kunnu leggja fólk undir stuldur, hor og manndráp. Men tað er ikki heilt innlýsandi, hví tann, sum skal opererast endiliga skal *leggjast*. Tað ber eisini til at operera sitandi patientar. Og tað ber eisini til at operera uttan at brúka knív, við laserstrálu til dømis.

»At leggja undir skurð« er ein tung, hátíðarlig og óbrúkilig formulering. Hví kunnu vit ikki siga operera, tá ið vit kunnu siga spasera, spankulera, spekulera, gartera, punktera, sanera og manerera?

Sum onkur fyrr hevur víst á, er tað blivið móti millum føroyskar málbøtarar at brúka seyðanøvn um kroppin á fólki. Álvarsamir læknar siga okkum, at garnar skulu eita *vil*, og tað danska 'tarmkanal' verður umsett til *viljaveit*.

Kanska kunnu vit fara til okkara svørtu vinir hvalirnar at finna okkurt gott orð fyri at operera? Tað er ikki uttan sjálvandi, at vit kveita til grannatjóð, og har finna vit mín sann, at 'operera' eitur 'at skera upp'. Hatta er jú funnin fressur. Vit kunnu læna frá íslendingum og siga, at *vit skera Jeltsin upp*. Og hvalurin hevur onnur orð, sum vit kunnu læna: Til dømis er 'kúla' eitt fitt orð fyri 'málreinsari', og 'hvølja' kann brúkast um hálar politikarar, sum siga »spara«, men meina »oyðsla«. Tá ið so liðugt er at skera upp og bulletinirnar fara at streyma út frá sjúkhúsinum um tilstandin hjá tí uppskorna, kunnu vit siga, at *seðlarnir koma út*.

D



© EAS, 1996

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: **Hanus Jacobsen**
Nes
Vágur

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: ARAN ISLANDS

J	A	M	E	S	-	C	O	N	N	O	L	L	Y	M	
A	L	D	I	S		O	P	N	I		I	A	N	N	I
83	D		R		S	L			G	I	F		N	I	K
J	A	M	E	S	J	O	Y	C	E		F	R	I	D	A
O	N	O		A		M	D		L		E	U		A	L
N		R	E	K	A	B	U	L		A	Y	R		R	A
A	K	A		S	H	A	N	N	O	N		I	D	O	
T	A		K	U	T				V	I	T		I	S	I
M	L		E	N		L		M	A	R	R		C		N
A	T	C	L		Y	O		A	R		E	V	U		I
N			T	I	P	P	E	R	A	R	Y		I	B	S
G	S	W	I	F	T		A	T		E	G	I	L		H
L	I	A	S		I	B		I	N	G	U	N		K	M
A			K	K		Ø	R	N		I	R	A	N		A
M	I	G		G	A	U			A	N			A	G	N
R	E	E	N	H	A	R	D	S	H	A	W		A	R	

Hvønn leygardag

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Loysunarorðið:

Navn

Bústaður

Bygd/býur

84

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48 D,
8000 Árhus C.

Húsið er opið mánadag–hósdag kl. 16–18 og fríggjadag frá kl. 21.

Føroyskur skúli fyri børn er annan hvønn leygardag kl. 11.

Føroyskur dansur er annað hvørt fríggjakvøld kl. 21.

Sertiltøk verða lýst á telefonsvararanum tlf. 86-180604.

SEYÐA SKRÁSETINGAR BÓK

Nú verður lættari hjá tygum at halda skil á seyðinum

Ein seyðaskráseting-arbók er nú útgivin. Í bókini er frágreiðing, útrokningar av t.d. meðalvekt v.m.

Bókin fæst til keyps á deildum MBM's. Um tygum ynskja tað, verður bókin send við postkravi.

Bókin kostar KR. **50,-**


MBM

L/f Meginfelag Búnaðarmanna Tlf. 21300

MBM · Hoyvík
MBM-Fóður, Kollafjørður

Aftur eitt RIMMAR TILBOÐ!

SHARP DV-6340SN



Vanl. prísur 9.850,-
Avsl. 2.400,-
7.450,

√ 25" Black Matrix myndarør
√ Innb. multitekst dekodara
√ Dup. síðu tekstskipan
√ AI-OPC myndastýring
√ Innb. IGR/NICAM stereo-dekodara
– umframt hópin av øðrum snildum.
Std. 695x537x435 mm

RADIO HANDILIN
v/ E & P Persson P/F
Handilskj., Box 119 · Havn
Tlf. 18277 Fax 18377